# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Europa til høgru

Búskaparligar kreppur hava ofta við sær, at veljarafjøldin velur víðgongdar flokkar ella víðgongdar politiskar rørslur. Fyri valið leygardagin til Europatingið vóru tekin, sum bendu á, at røringur var komin í europisku veljarafjøldina, og at rákið var til høgru. Valúrslitini, sum í morgun eru kunngjørd um alt ES vísa eina markanta høgrasnaring í Europa. Hóast henda høgrasnaring sum sagt var væntað, so mundu fáur eygleiðari roknað við eini so ógvusligari broyting, sum við hetta val.

Stóri taparin er europeisku sosialdemokratisku flokkarnir, sum eru farnir aftur um alt samveldið. Hetta rák hevur rakt sterstakliga meint í Bretlandi og í Týsklandi, har verulig skrædl vóru. Bretski Labour leiðarin Gordon Brown, sum frammanundan var illa fyri av innanflokstrupulleikum og einum sera vánaligum kommunuvali, er nú púra eyðmýktur, og flestu eygleiðarar halda, at dagar hansara sum Labour leiðari eru taldir.

Úrslitið av valinum til Europatingið gevur stóran borgarligan meiriluta í nýggja Europatinginum, men hetta gevur ikki í sjálvum sær teimum borgarligu arbeiðsfrið til at reka høgrapolitikk. Hetta kemst av, at nógv av teimum mest høgravendu, sum nú eru valdir á Europating eru ES mótstøðufólk. Hesi eru fólk við víðgongdum nationlistiskum sjónarmiðum og tískil fólk, sum meta ES sum eina hóttan móti tjóðskaparligum áhugamálum í egnum landi. Afturat hesum kemur, at somu bólkar eru fíggindaliga sinnaðir mótvegis innflytarum og ímóti muslimska heiminum sum heild. ES, sum hevur siðvenju fyri einum libaralum og opnum innflytarapolitikki fær uttan iva stórar trupulleikar á hesum øki, og spenningurin millum ES og víðgongdu partarnar av muslimska heiminum fer tí at vaksa. Samantikið er nýggi borgarligi meirilutin á Europatingi ein politisk skurvblanding, sum fer at hava sera trupult við at semjast innanhýsis, og Europatingið verður tískil ein spegilsmynd av tí politiska ruðuleika, sum hesa tíð valdar í flestum europeiskum lóggávutingum.

Sostatt er talan um eina trupla støðu, sum ikki fer at gera samstarvið í Europa léttari ella meira úrslitaríkt. Hetta meta flestu eygleiðarar mikið spell at vera, tí tann herviliga búskaparkreppa, sum leikar á, krevur eitt ES, sum kann fáa bast kreppuni. Hetta krevur breiðar semjur um víðfevnandi fíggjarpolitisk og búskaparpolitisk tiltøk, sum bert kunnu verða framd í felag og í breiðum politiskum semjum. Valúrslitið boðar ikki frá góðum í so máta, og útlitini fyri felagseuropeiskum kreppuátøkum eru munandi versnað eftir valúrslitið, sum av góðum grundum hevur skelkað sosialdemokratar, sosialistar og grønar flokkar um alt Europa. Tað, sum ger valúrslitið dapurt fyri mangar europearar, er, at úrslitið bendir á vaksandi fremmandahatur millum manna um alt Europa. Hatsku tónarnir minna um nakað, sum vit áður hava upplivað í Europa, og sum ikki má koma aftur. Livst so spyrst.

**Sosialurin**

## Jenis var við til at skerja blokkin!!

**JOHAN PETERSEN**



Hóast Jenis meir enn nakar annar tekur Jesuspápa til inntøku fyri sínum politikki, himprast hann ikki við at manipulera/lúgva.

Miðflokkurin tvíheldur um, at hann var ímóti blokkniðurskurðinum. Seinast førir Jenis av Rana hetta fram í kjakarínum mikudagin.

**Blokkniðurskurðurin orsakað av Yvirtøkulógini**

Men hvør er so sannleikin? Jú, orsøkin til, at blokkurin frá 2002 at rokna varð skorin niður við út við 400 mió. kr., er yvirtøkulógin frá 2001. Við hesi lóg yvirtóku vit fíggjarligu ábyrgdina av nøkrum av málunum og málsøkjunum á lista A (fólkaskúlin, læraraútbúgving, frítíðarundirvísing, handils-, tekniskir-, maskinmeistara- og maskinistskúlar og almenn forsorg). Kostnaðurin av hesum yvirtøkum var 366 mió. kr.

Ikki færri enn 5 ferðir verður í viðmerkingunum til lógaruppskotið víst á, at blokkurin fer at minka, um uppskotið verður viðtikið:

1. ferð: ... at taka yvir hesi mál og málsøki við atliti at lóggávuvaldi, heruppi í fíggjarvaldi ...

2. ferð: ... fer at hava avleiðingar fyri inntøkur á fíggjarlógini við tað, at heildarveitingarnar úr Danmark verða lækkaðar samsvarandi yvirtøkunum.

3. ferð: ... heildarveitingarnar lække sostatt 356 mió. kr. ... (seinni broytt til 366 mió. kr.)

4. ferð: .. oman fyri standandi metingar av fíggjarligu avleiðingunum eru sostatt at skilja sum ei lýsing av ...

5. ferð: ... avleiðingar av uppskotinum: Fíggjarligar/búskaparligar avleiðingar fyri landið/landsmyndugleikar: Ja.

**Miðflokkurin tók undir**

Jenis av Rana tekur undir við uppskotinum, hóast hann í álitinum m.a. sigur:

... Miðflokkurin førdi fram, at vit ikki kundu loyva okkum, gjøgnum einvísa minkan av blokkinum ...

Heilsuverkið hevur neyvan í nýggjari tíð nakrantíð verið so órøkt og niðurundirkomið ... gomlu okkara liggja hjálparleys ... viðurskifti teirra brekaðu og sálarliga veiku eru katastrofal ... føroyska skúlaverkið er so illa umsitið, at tað meira og meira tykist fara í upployst ing ... og vit kundu hildið á við dømum um eitt samfelag í órøkt ... Tí kenst tað fleirfalt løgið, at landsstýrið einvíst ætlar at byrja lækkan av heildarveitingini (blokkinum) ...

Miðflokkurin metir hesa ætlan høpisleysa, serstakliga í tí vána støðu nógvir samfelagsbólkar búleikast undir. (Sitat endað).

**Jenis av Rana atkvøddi fyri**

Men hvør atkvøðir fyri uppskotinum við 2. viðgerð 21.09.2001 og við 3. viðgerð 28.09.2001: jú, tað ger Jenis av Rana!!!!

Avgerðin um blokkniðurskurð er tikin við Yvirtøkulógini, og at Miðflokkurin við neyðugu fylgilógini hevur atkvøtt ímóti, er málinum púra óviðkomandi (í viðmerkingini til fylgilógina stendur: ... Hetta er beinleiðis úrslit av, at endaliga yvirtøkan ... varð framd .. (Yvirtøkulógin) ...(sitat endað)).

Kanst tú leypa á bláman og ikki blíva vátur? Tað kundi Móses, tá ið hann leiddi ísraelsfólk tvørtur um Reyðahavið, men Jenis? Nei!! Er Miðflokkurin djúpt óseriøsur??

(Sí www.logting.fo > Tingmál > Løgtingstíðindi 1880-2006 > 2001 > Vanlig tingmál > 5.Uppskot til løgtingslóg um at taka yvir málini og málsøkini á lista A í heimastýrislógini (Yvirtøkulógin)).

## Hugnalig familjulega á Selatrað

**TÍÐINDASKRIV**

2. – 5. juli verður skipað fyri hugnaligari familjulegu á Selatrað. Legan verður skipað sum ein skótalega við skótavirksemi, har øll familjan, ung sum gomul, royna alskyns virksemi í fýra dagar. Hetta er eitt upplagt høvi hjá familjuni at hugna sær saman.

**Nógv ymiskt virksemi**

Á leguni kunnu tit smíðja lutir úr jarni á glóðheitu essini, síga niður fram við fossinum á Blásenda, læra at nýta knív og kynda bál, gera mat á báli, byggja torn úr raftum ella royna onkran annan av teimum mongu aktivitetunum. Fyri tey minstu børnini eru m.a. rannsóknarferðir oman á sandin, inn í viðarlundina og niðan í ánna.

Høvið verður eisini til at fara ein túr við ferðaleiðara til tingstaðin, gálgasteinin og basaltsúlurnar.

Sjálvsagt verða eisini legubálum við felagssangi, forðarenningar og mangt annað, sum hoyrir eini rættari skótalegu til.

**Formlig yvrtøka av legubálsøkinum**

Leygardagin 4. juli verður formlig yvirtøka av legubálsøkinum, sum júst er nýgjørt og uttan iva er flottasta legubálsøki í Norðanlondum við tí vakrasta útsýni út yvir Sundalagið ein kann hugsa sær. Eingin ivi er um, at legubálsøkið fer at vera karmur um mangt forvitnisligt tiltak komandi árini.

Í sambandi við yvirtøkuna verða røður hildnar, tónleikur spældur og rættiligur hátíðardámur verður á leguni.

**Fleiri gistingarmøguleikar**

Øll eru vælkomin at koma og fara sum teimum lystir, men lagt verður upp til at fólk yvirnátta á Selatrað. Møguleiki er fyri at búgva í tjaldi, kampingvogni ella báti.

**Skjótt og lætt**

Fyri at lætta um flutningin verður gamla rutan millum Hósvík og Selatrað opnað aftur meðan legan er. Fasilitetirnir á Selatraðdeplinum standa opnir fyri fólk at brúka, so sum wc, brúsir, grillir o.a. Møguleiki er fyri at keypa mat á deplinum, bæði sum liðnan morgunmat, døgverða ella náttturða og eisini til matgerð á báli og til at leggja á grillirnar.

**Sjálvsagt rúsfrí**

Av tí at legan er skipað sum ein skótalegu er hon rúsfrí.

Útlendskir gestir eru sjálvsagt eisini vælkomnir á leguna.

**Kom og hugna tær**

Les meira um tiltakið og um prísirnar inni á heimasíðu okkara: www.skoti.fo ella ring og hoyr nærri á skrivstovu okkara tlf. 311075 og 254707

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Elin Vatnhamar Olsen evo@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Eilen Anthoniussen eilen@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Rógvi Nybo rogvi@sosialurin.fo
Eirikur í Jákupsstovu eij@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Harald í Kálvalíð harald@ras2.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.